# Ætlar sær at togast við Mentamálaráðið

## Herálvur Jacobsen ætlar sær at syrgja fyri, at Lærarafelagið verður ringa samvitskan hjá Mentamálaráðnum, um hann verður valdur sum formaður í Føroya Lærarafelag

Uni Holm Johannesen

– Lærarafelagið skal fyrst og fremst geva Mentamálaráðnum ringa samvitsku í fleiri málum.

Soleiðis sigur Herálvur Jacobsen, sum bjóðar seg fram at verða komandi formaður í Føroya Lærarafelag.

Herálvur Jacobsen ger greitt, at komandi formaðurin skal syrgja fyri, at áhugamálini hjá felagnum verða væl og virðiliga hoyrd.

Og tað er hann sinnaður at stríðast fyri.

– Lærarafelagið skal hoyrast, nú sparingar fara fram í fólkaskúlunum. Tað er sera umráðandi, at vit hava dugnaligan og skikkaðan ungdóm, sum fær neyðuga lærdómin. Vit vita, at sparingar fara fram, men innihaldið í frálæruni skal framvegis verða dagført, so næmingurin dugir tað, sum krevst. Tað skal Lærarafelagið millum annað syrgja fyri, sigur Herálvur Jacobsen.

### Skulu hava greið boð

Kaj Leo Johannesen, løgmaður, boðaði í sínari røðu á ólavsøku frá, at kommurnar skulu umsita fólkaskúlan um trý ár.

Men hesum tekur Herálvur Jacobsen ikki undir við, sum støðan er í løtuni.

Høvuðsendamálið skal altíð verða at menna fólkaskúlan.

– Um tað bara ræður um at flyta summar lønir, so dugi eg ikki at síggja, at tað loysir seg. Tað skal loysa seg fyri fólkaskúlan, og ikki bara umsitingarliga. Vit skulu hava trygt grundarlag fyri, at avgerðin er røtt, sigur Herálvur Jacobsen.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í Mentamálum, hevur boðað frá, at tað er neyðugt at útseta fleiri av ætlaðu tilboðunum á Føroya Læraraskúla, tí vikartímar eru ikki til lærarar, sum fara undir lestur.

Millum annað fer nýggi eftirútbúgvingarstovnurin á Frælsinum undir Føroya Lærarafelag og Fróðskaparsetrinum ikki at bjóða nakra stóra eftirútbúgving til lærarar komandi skúlaáar.

Fólkaskúlin hevur fingið fleiri frammaná seinasta árið, og tað eru slík viðurskifti,



*– Vit skulu skapa bestu karmarnar fyri skúlarnar. Lærarafelagið skal vita, hvussu sparingarnar ávirka arbeiðsumstøðurnar hjá lærarunum, slær Herálvur Jacobsen fast.*

sum Herálvur Jacobsen fegin vil fáa í rættlag.

– Vit skulu skapa bestu karmarnar fyri skúlarnar. Lærarafelagið skal vita, hvussu sparingarnar ávirka arbeiðsumstøðurnar hjá lærarunum, slær Herálvur Jacobsen fast.

Hann leggur afturat, at fleiri ábøtur eru gjørdar, serliga í byrjunarundirvísingini, men spurningurin er, um sparingarnar ikki hava við sær, at Lærarafelagið missur alt á gólvið.

### Stór avbjóðing

Herálvur Jacobsen varð valdur í nevndina í Føroya Lærarafelag fyri tveimum árum síðan. Hann er lærari í skúlanum í Sørvági.

Hann hevur stóran áhuga í skúlapolitikki, og tí bjóðar hann seg fram.

– Tað er ein stór og áhugaverd avbjóðing at stjórna Føroya Lærarafelag. Tú kann kanska siga, at eg vil hava størri ávirkan enn frammanundan. Men øll mál skulu loysast í felag, vísir Herálvur Jacobsen á.

Hvørjir møguleikar hevur tú at vinna valið?

Herálvur Jacobsen flennir, áðrenn hann svarar.

– Tað dugi eg ikki at siga. Páll Poulsen er ein verdugur avbjóðari, sum eg havi virðing fyri, sigur Herálvur Jacobsen.

uni@sosialurin.fo

### Felagsins endamál og virki

Føroya Lærarafelag hevur sum endamál at røkja starvsligu, lønarligu og uppalingarligu áhugamálini hjá fólkaskúlalærarum í Føroyum, at styrkja og stimbra samanhaldið, at arbeiða fyri menning fólkaskúlans og at fremja vælskipaðan skúlaskap á kristnum grundarlagi í Føroyum.

**Tað verður millum annað roynt við, at:**

- Nýta samráðingarrættin við landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar og aðrar skúla- og tænastumyndugleikar
- Ansa eftir, at avgerðir millum myndugleikarnar og lærarar um lønarviðurskifti og arbeiðskor verða hildnar
- Røkja viðurskifti limanna og myndugleikanna millum
- Arbeiða fyri, at arbeiðslíkindini hjá tí einstaka liminum eru góð og trygg
- Veita limum sakkøna hjálp, sum teir í lærarayrki sínum hava tørv á, og sum felagsnevndin heldur seg kunna stuðla

### *Fær bara seks mánaðir*

Eykaaðalfundurin, og valið av formanni, verður 11. september, tí Magnus Tausen reisti seg úr formanssessinum í vár.
Páll Poulsen og Herálvur Jacobsen stilla upp.
Komandi formaðurin sleppur bara at sita í umleið eitt hálvt ár í fyrsta umfari, tí í vár verður regluliga formanssvalið. Tá verður aftur formannsval.

# Kommurnar eru ikki til reiðar

## Páll Poulsen er av tí greiðu sannføring, at tað eru fáar kommurnar, sum eru til reiðar at umsita fólkaskúlan

Uni Holm Johannesen

Tað reisti fleiri spurningar.

– Hin 1. august í 2013 taka kommununar við ábyrgdini av fólkaskúlanum, segði Kaj Leo Johannesen, løgmaður, á ólavsøku.

Men nei, sigur Páll Poulsen, virkandi formaður í Føroya Lærarafelag. Ikki sum støðan er í løtuni.

Orsøkin er einføld. Kommurnar eru ikki til reiðar.

– Tað eru fáar kommunur, sum eru fíggjarliga og hugsjónarliga førar fyri at taka slíka uppgávu á sínar herðar. Tað er eingin fyrimunur fyri fólkaskúlan, sum skal hava tryggar karmar. Tí mæli eg frá hesum, sum støðan er í løtuni, slær Páll Poulsen fast.

Málið um umsitingarliga partin av fólkaskúlanum er millum komandi stóru uppgávurnar hjá komandi formanninum í Føroya Lærarafelag.

Og Páll Poulsen vil fegin standa á odda fyri samráðingunum.

### Verandi formaður

Páll Poulsen hevur verið virkandi formaður, síðan Magnus Tausen, sum hevði verið formaður seinastu fimm árini, fór í annað starv í summar.

Páll Poulsen hevur stóran áhuga í fakfelagsarbeiði, og hann vil fegin gera sína ávirkan galdandi.

– Eg eri sannførdur um, at eg eri førur fyri at gera mun. Allir nevndarlimir hava sínar uppgávur, men eg havi ongar trupulleikar við at verða myndin av Lærarafelagnum, sigur Páll Poulsen.

### Fleiri stór mál

Føroya Lærarafelag hevur fleiri knútar, sum skulu loysast komandi tíðina.

Fíggjarmálaráðið fekk handað serkrøvini til sáttmálasamráðingarnar fyri tveimum vikum síðan.

Spurningurin, um kommurnar skulu umsita fólkaskúlan, skal svarast.

Við kroystu fíggjarstøðuni, sum landið er í, er ikki væntandi, at nýggi eftirútbúgvingarstovnurin fer at økja stórvegis um útbúgvingartilboðini. Í roynd og veru eru tilboðini til eftirútbúgving av lærarum á so lágum støði júst nú, at tað bara kann ganga framá. Føroya Lærarafelag, og Páll Poulsen, vil leggja doyin á at bøta um hesi viðurskiftini.

– Endamálið er altíð at menna fólkaskúlan, og Lærarafelagið skal leggja grundarlagi undir menningina og framvegis ganga á odda í kjakinum um føroyska skúlan og undirvísingina. So tað eru stórar avbjóðingar fyri framman, sigur Páll Poulsen.



*Páll Poulsen sigur at kommunurnar eru ikki førar fyri at umsita fólkaskúlan í løtuni*

### Vil einki siga

Páll Poulsen vil ikki meta um sínar møguleikar at verða valdur.

– Nei, tað havi eg ikki hug til. Vit eru tveir sum stilla upp, og vit hava eins góðan møguleika, sigur hann.

uni@sosialurin.fo